# Gomul stjørna og ung talent

**Í Malmø verður tann eftirhondini siðríka Sigemann-kappingin í hesum døgum telvað. Veteranurin Jan Timman er á deildum fyrsta plássi saman við eitt nú unga amerikanska talentinum Hikaru Nakamura.**

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Hikaru Nakamura er við í oddastríðnum í Malmø*

Tað serliga við Sigemann er, at fyrstu fimm umførini verða telvd í Malmø og seinastu fýra umførini verða telvd í Keypmannahavn. Hetta hevur verið mannagongdin síðani 2003 og hevur tað riggað væl.

Sigemann varð fyrstu ferð telvað í 1993 og millum navnframir vinnarar kunnu nevnast Ivan Sokolov (1995), Viktor Korchnoi (1996), Boris Gelfand (1999), Judit Polgar (2000), Nigel Short (2002) og Vassily Ivanchuk (2003).

Í fjør vunnu Curt Hansen og Peter Heine Nielsen, báðir úr Danmark. Norska undurbarnið Magnus Carlsen bleiv nr. 3. Í ár eru hvørki Nielsen ella Carlsen við, men onnur spennandi nøvn hava fingið pláss teirra. Eitt nú 17 ára gamli Hikaru Nakamura (2657), sum hevur havt eina óvanliga framgongd seinasta ári. Við sínum høga ratingtalið er hann í ferð við at blanda seg í absoluttu elituna.

Eisini 19 ára gamli danin Davor palo (2525) hevur fingið møguleikan í ár, men hansara hálva stig í fyrstu trimum umførunum í Malmø boðar ikki frá góðum úrsliti.

## Timman og teir ungu

Hollendarin og fyrrverandi HM-avbjóðarin Jan Timman (2607) hevur góðan vind í Malmø. Veteranurin, sum m.a. niðurspældi Palo í fyrsta umfari, hevur telvað væl og tykist at hava stabiliserað seg omanfyri 2600-markinum. 53 ára gamli Timman var annars leingi niðanfyri 2600.

Eftir triðja umfar hava tríggir telvarar lagt seg á odda í Sigeman: Timman, Nakamura og Ioardachescu. sum eisini er úr yngra ættarliðnum.

Curt Hansen átti at havt vunnið á Nakamura í fyrsta umfari, men hóast tað bert bleiv til javnleikur, hevur Curt telvað væl og er beint í hølunum á trioini. Danmarksmeistarin í ár, Sune Berg Hansen, kom á stigatalvuna sunnudagin í triðja umfari, tá hann vann á Emil Hermansson.

## Støðan eftir 3. umfar

| | | |
|---|---|---|
| GM Timman | (2607) | 2,5 |
| GM Nakamura | (2657) | 2,5 |
| GM Iordachescu | (2609) | 2,5 |
| GM C. Hansen | (2633) | 2,0 |
| GM Sasikiran | (2642) | 2,0 |
| GM H. Persson | (2533) | 1,0 |
| GM S. Hansen | (2553) | 1,0 |
| GM Hector | (2513) | 1,0 |
| IM Palo | (2525) | 0,5 |
| IM Hermansson | (2432) | 0,0 |

## Fischer er í Íslandi

Eftir at hava búleikast í fjareystri seinastu mongu árini, er kontroversielli fyrrverandi heimsmeistarin Bobby Fischer vorðin íslendskur ríkisborgari. Legendan hevur í seinastuni verið í ymiskum trupulleikum, men íslendskir vinir hansara hava veitt honum eina hjálpandi hond við at geva honum íslendskan ríkisborgararætt.

Fyri góðum mánaða síðani kom Fischer til landið, har hann í 1972 gjørdist heimsmeistari. Av tíðindum og myndum at døma, hevur Fischer fingið fyrstafloks vælkomu og viðferð í grannalandi okkara. Fischer kallar Ísland sítt nýggja heim og ætlar sær at verða verandi. Hann fer neyvan at telva av álvara aftur.

## Talvið hesa vikuna

**IM Hermansson (2432) – GM Iordachescu (2609)**
13th Sigeman & Co Copenhagen/Malmø (2), 16.04.2005

**1.e4 e5 2.Rif3 Rif6 3.Rixe5** Russisk byrjan **3...d6 4.Rif3 Rixe4 5.d4 d5 6.Bd3 Ric6 7.0—0 Be7 8.c4 Rib4 9.Be2 Be6 10.Ric3 0—0 11.Rie5 c5 12.Rixe4 dxe4 13.d5 Fc7 14.Rig4** f4 var ein betur roynd. Nú fær svartur betur støðu **14...Bxg4 15.Bxg4 Rid3 16.Bd2 Bf6 17.Rb1 Bd4! 18.Be3 f5 19.Be2 Bxe3 20.fxe3 Rie5 21.Fd2 Rf6** Álopið er sett í gongd **22.Rbd1 Fd6 23.a3 Raf8 24.b4 b6 25.bxc5 bxc5 26.Fa5 g5! 27.g3 h5 28.Rb1 h4 29.gxh4 f4!** Svartur telvar við høgari risiko. Kann væl vera at alskyns talvteldur ikki halda svartan telva rætt, men í praktiskari telving er tað sera torført hjá hvítum at allatíð skula finna røttu leikirnar 30.hxg5



**Støðumynd eftir 30.hxg5**

**30...f3 31.gxf6 Rig4** Hóttur Ff2++ **32.Rf2 Rixf2 33.Fxa7?** Fe1 hevði møguliga bjargað talvinum, men nú vinnur svartur lættliga **33...Rih3+ 34.Kh1 Fxf6 35.Bf1 Rif2+ 36.Kg1 Rig4 37.Fc7 f2+ 38.Kh1 Rixe3 39.Fg3+ Fg7 Fxg7 40.Kxg7** Hermansson kann einki gera aftaná frúgvabýtið og gavst tí **0—1**

## FM í boccia 2005

Um vikuskiftið skipaði ÍSB fyri FM-kapping í boccia, og gekk hetta fyri seg í Ítróttarhøllini á Hálsi.

Maud Wang Hansen, nevndarlimur í Javna, setti kappingina, og so fóru teir nærum 100 luttakararnir at kappast. Hetta er samstundis higartil største boccia-kappingin, sum hevur verið í Føroyum. Spælt varð í fimm bólkum, og framganga úrslitini niðanfyri.

Barnabólkurin:
1 Dánjal Jákup Djurhuus
2 Jann Dávur Dam
3 Tummas Ejdesgaard

Systkin:
1 Christoffur Dam
2 John M. Haraldsen
3 Joanna J. Poulsen

Bólkurin fyri menningartarnað:
1 Símun Petur Zachariasen
2 Hentzia Hansen
3 Jan Lindberg

Rørslutarnað vaksin:
1 Marius Johansen
2 Martin Johannesen
3 Jóhanna Sørensen

Pensionistar:
1 Karl Simonsen
2 Marianna Simonsen
3 Samly Reinert

## Unglingameistara kapping

Svimjisambandið hevur nú boðað frá, at unglingameistarakappingin í ár verður hildin í Klaksvík í døgunum, 22., 23. og 24. apríl.

Sagt verður, at talan í ár verður talan um einar 70 svimjarar, sum við hesum fara at leggja seinastu hond á inniverandi kappingarár. Tó so, so hava fleiri av svimjarunum eisini svomið seg til luttøku í FM-kappingini, sum verður fyrst í mai mánaði.

Mong munnu hesaferð vera eitt sindur eyka spent til kappingina, tí flestu UM svimjararnir hava í ár møguleikan at luttaka til Donsku Árgangsmeistarakappingina ið verður í juni í Danmark. Til hetta skulu svimjararnir tó svimja undir eina ávísa kravtíð, og á tann hátt verður UM í ár brúkt sum eitt slag av barometri fyri, hvussu okkara svimjiungdómur stendur seg í mun tey í Danmark. Hetta er fyrstu ferð at føroysku svimjararnir hava høvi til at luttaka á jøvnum føti við donsku svimjararnar til eitt árgangsmeistara-skap

**-jm**

## Taptu finaluna

Tað eydnaðist ikki hjá Rúna Weihe og liðfeløgum hansara í BK Tromsø at vinna norska flogbóltsmeistaraheitið annað árið á rað.

Tromsø vann annars fyrsta av teimum trimum finaludystunum móti Nyborg úr Bergen, men teir megnaðu tó ikki at halda fast.

Seinasti finaludysturin varð leiktur um vikuskiftið, og hendan dystin vann Nyborg í einum spennandi fimm-settara.

Við Útvarpið segði Rúni Weihe, at tað sjálvandi kendist keðiligt at tapa seinasta finaludystin, men sæð yvir alt árið heldur hann tó, at silvurmerkini vóru í lagi.

**-jm**



*Tað eydnaðist ikki hjá Rúna Weihe at endurvinna norska meistaraheitið*